# eg deyður



kostað mær dýrt, heldur ungi maðurin.

### Fongslaður og avrúsaður

Men ein dagin bleiv ungi føroyingurin tikin av donsku løgregluni við lutfalsliga stórari nøgd av rúsevnum,

> *– Eg livdi bara av rúsevnum. Eg át kanska eina hálvan sandwich um vikuna og drakk tvær fløskur av kakaomjólk. Annars livdi eg bara í einum ævigum rúsi, og kroppurin hjá mær bleiv spakuliga uppetin*

og hann bleiv dømdur fleiri ára fongsulsrevsing.

– Tað var bjargingin hjá mær. Bleiv eg ikki tikin, varð eg deyður í dag, tað er vist. Eg kom inn at sita, og samstundis bleiv eg sendur í viðgerð fyri mína misnýtslu, og eg bleiv avrúsaður. Hevði eg ikki komið inn at sita, hevði eg í dag verið deyður av míni misnýtslu, heldur tann 25 ára gamli, sum í dag framvegis er í viðgerð fyri misnýtsluna, hóast hann hevur verið rúsfríur í langa tíð.

### Hóttur eftir lívinum

Tað var tó ikki bara sum at siga tað at sita í fongsli í Danmark hjá tí unga føroyinginum, tí netverkið hjá teimum, ið selja rúsevnir, røkkur eisini inn um fongsulsrimarnar.

– Tá ið eg bleiv tikin, hevði eg rúsevnir fyri

> *– Misnýtslan hevur oyðilagt meg á nógvar mátar, og millum annað er sjálvsvirðingin hjá mær fullkomiliga burtur. Eg havi einki til yvirs fyri mær sjálvum, og fyri at siga tað akkurát, sum tað er, so ræðist eg at koma út millum fólk*

nógvar túsund krónur uppi á mær, sum ein pushari átti. Rúsevnini legði løgreglan sjálvsagt hald á. Hetta gjørdi, at meðan eg sat inni, kom ein annar fangi til mín og segði, at um eg ikki rindaði pusharanum fyri rúsevnini, so kom eg at gjalda fyri tað við lívinum. Eg royndi at greiða frá, at eg hevði ikki pengarnar, og at løgreglan hevði tikið evnini, men tað løgdu teir einki í – eg hevði bara at gjalda. Tað fekk eg ikki gjørt, og tí noyddist eg at verða serstakliga ansin restina av tíðini, ið eg sat inni í Danmark, greiðir ungi maðurin frá.

### Ræðist fólk

Tann 25 ára gamli føroyingurin, sum í løtuni situr síðstu mánaðirnar av fongsuldóminum í Føroyum, skal í næstum út í samfelagið aftur, men tað er ikki nakað, sum hann sjálvur metur seg verða kláran til.

– Misnýtslan hevur oyðilagt meg á nógvar mátar, og millum annað er sjálvsvirðingin hjá mær fullkomiliga burtur. Eg havi einki til yvirs fyri mær sjálvum, og fyri at siga tað akkurát, sum tað er, so ræðist eg at koma út millum fólk, sigur hann.

Somuleiðis er hann bangin fyri aftur at fella fyri freistingini við rúsevnum, og hann hevur tí í samráð við fakfólk gjørt av, at tá ið hann verður leyslatin, fer hann beina leið á viðgerðarstovnin Heilbrigdið á Velbastað, har hann skal venja seg við at verða rúsfríur og ein partur av samfelagnum.

– Tað fer ivaleyst at taka rúma tíð, áðrenn eg aftur verði klárur at verða ein vanligur partur av samfelagnum, men eg fari at gera mítt besta, hóast rúsevnini hava merkt meg fyri lívið, sigur 25 ára gamli føroyingurin.

Í eini roynd at fyribyrgja at onnur ung koma út í somu støðu sum hann, ferðast tann ungi maðurin í løtuni út á fólkaskúlar í Føroyum, har hann saman við einum ráðgeva frá Heilbrigdinum og einum umboði fyri løgregluna greiðir frá vandanum við rúsevnum.

– Eg vóni, at eg á tann hátt kann forða fyri, at onnur koma út á eitt síðuspor, soleiðis sum eg gjørdi, sigur hann at enda.

# – Vit royna at lýsa tann kalda veruleikan



*Saman við einum fyrrverandi misnýtara ferðast Jens Jensen frá løgregluni og Poul Jákup Thomsen frá Heilbrigdinum út á skúlar kring landið, har teir greiða frá kalda veruleikanum um rúsevnismisnýtslu og avleiðingarnar av henni.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í løtuni ferðast Poul Jákup Thomsen, ráðgevi á Heilbrigdinum, Jens Jensen, løgreglumaður og ein fyrrverandi rúsevnismisnýtari út á fólkaskúlar í Føroyum, har teir greiða frá, hvussu vandamikið eitt lív við rúsevnum er.**

KUNNING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað eru Fyribyrgingarráðið, løgreglan og Lions Club, ið hava tikið stig til átakið, sum partvís er fingið í lag, tí at tað hevur víst seg, at rúsevnismisnýtsla er ein vaksandi trupulleiki her á landi. Jens Jensen, løgreglumaður, greiðir frá, at fyrr var tað næstan bara hash, ið føroyskir rúsevnismisnýtarar brúktu. Men hesi seinnu árini eru rúsevnini blivin alsamt sterkari.

### Avleiðingarnar eru ræðuligar

– Í dag er tað eingin trupulleiki at fáa fatur á bæði amfetamin og ecstacy í Føroyum, meðan tað er heldur truplari at fáa fatur á eitt nú kokain, sum tó finst her á landi, sigur Jens Jensen.

Poul Jákup Thomsen, sum í sínum dagliga yrki fæst við misnýtarar, tekur undir við Jens Jensen.

– Vit síggja fleiri og fleiri misnýtarar, sum doyggja av misnýtsluni, og tí er tað ógvuliga umráðandi at fara út á skúlar at greiða frá, hvussu vandamikil rúsevnini eru. Millum ung verður rúsevnisumhvørvið ofta fatað sum ein spennandi og lokkandi verð, og tí er tað alneyðugt, at vit fara út og greiða teimum frá um tann kalda veruleikan, sigur Poul Jákup Thomsen.

Hann hevur í sínum arbeiði sæð nógvar lagnur, ið eru farnar í skeljasor av misnýtslu, og hann dylur ikki fyri, at hjá teimum, sum eru komin út í misnýtsluna, er tað ógvuliga trupult at koma á rættkjøl aftur.

– Misnýtarin missir alt tað, sum eitur sjálvsvirðing, sjálvsálit, likamliga vælveru, vinir, kærleika og annað, ið vit onnur meta gevur dagligdegnum innihald. Tað er umráðandi, at vit úti á skúlnum greiða næmingunum frá slíkum, um eg so má siga, praktiskum upplýsinum, sigur Poul Jákup Thomsen.

### Stórur áhugi

Teir tríggir, ið fara út at greiða frá rúsevnum og misnýtslu, siga, at tað er sera stórur áhugi fyri at fáa teir út á skúlarnar at greiða frá.

– Vit hava fingið nógvar áheitanir og hava verið á nógvum skúlum. Sum útgangsstøði verður sagt, at vit fara út at tosa við tey, sum ganga í 8. flokki, tí tá verður mett, at næmingarnir eru búnir til slíkt, men tað vísir seg mangan, at tað eisini koma næmingar úr øðrum flokkum at lurta, siga teir. Í sambandi við vitjanirnar úti á skúlunum, eru bíløgd nøkur armbond við tekstinum nei takk, ið teir fara at býta út til næmingarnar í hesum sambandi, men tey eru tó ikki komin enn, greiða teir tríggir frá.

Tó halda teir eisini, at tað fyribyrgjandi arbeiði kundi við, at man kunnað foreldur at børnum í 4. flokki, har man kundi tosað við foreldrini um, hvussu stóran týdning tað er at hava gott samskifti við síni børn, soleiðis at man kann fylgja við í lívinum hjá teimum.

– Samskifti við børnini kann verða ein ógvuliga týðandi partur, tá ið tað snýr seg um at forða fyri, at tey koma út á eitt síðuspor, siga teir tríggir.

Enn er ikki greitt, hvussu leingi teir tríggir fara at ferðast kring landið, men soleiðis sum áhugin, bendir alt á, at tað verður eina løtu afturat.